# KFUM-skótarnir í Føroyum

**Landsnevndarfundur** Fundur nr.: 06-14
Stað: Skrivstovan hjá KFUM skótunum Dagfesting: 03-12-14

| Navn: | Tlf: | Mail: | Init | Uppmøtt: |
|---|---|---|---|---|
| Arne Debess Madsen | 290877 | arnedm82@gmail.com | ADM | Ja |
| Beinta Kollslíð | 287964 | beinta14@hotmail.com | BK | Nei |
| Olga Arnfinnsdóttir | 261770 | olga.arnfinnsdottir@gmail.com | OA | Nei |
| Bjarni Hentze | 222419 | bjahen@hotmail.com | BH | Ja |
| Oda Maria Johannesen | 270252 | om-johannesen@hotmail.com | ODJ | Nei |
| Bogi F. Christiansen | 507062 | bogifchr@gmail.com | BFC | Ja |
| Helgi Simonsen | 589159 | helgi.s@hotmail.com | HS | Nei |
| Karl Viðstein | 519690 | karlw.viðdstein@gmail.com | KV | Nei |
| Karl Aage Hansen | 505858 | karlaage@meyl.fo | KAH | Nei |
| Jóna Venned | 218332 | jonavenned@gmail.com | JV | Ja |
| Ingibjørg Johannesen | 588331 | ingjoh85@gmail.com | IJ | |

**Fundur settur:** 15.50

**Skrá:**

- Roknskapur 2013/14 til góðkenningar
- Heimasíða til Selatrað
- Leiðarastevna í Februar
- Skótakontór
- Starvsfólk og tiltøk á Selatrað
- Sjóskótar
- Nýggir Bólkar
- Ymiskt

**Roknskapur 2013/14 til góðkenningar:**

Roknskapurin 2013/14 skal sendast til gransskoðaran til góðkenningar, roknskapurin bleiv gjøgnumgingin.

**Heimasíða til Selatrað:**

Kristjan R. Gásadal arbeiðir í løtuni við at gera nýggja heimasíðu til Selatrað, Kristjan hevur víst Arna tað sum hann hevur gjørt higartil, og tað sær gott út, og hon er einkult at brúka.

Kristjan kemur á næsta landsnevndarfund at greiða frá hvat hann hevur gjørt og vísa heimasíðuna fram. Hon verður liðug síðst í januar 2015.

Fíggjarætlanin fyri heimasíðuna liggur á Google dreiv undir Verkætlanir – heimasíða

Ætlanin er at heimasíðan skal eita www.Selatrad.fo  hetta mugu vit fáa loyvi til frá fólkunum í bydgini.

**Leiðarastevnan í februar:**

Í ár eigur leiðarastevna at vera, men tað má vera eykalandsfundur av tí, at reglugerðin hjá FSR skal góðkennast.

Hon verður 7-8 februar á Selatrað.

Innkallingin skal sendast út skjótast gjørligt.

**Skótakontór:**

Í løtuni hava vit tilsamans 1 fulltíðarstarv á kontórinum, ætlanin er at fáa 2 fulltíðarstarv, so vit betur kunnu røkja tær uppgávurnar sum eru tengdar at kontórinum.

Ætlanin er at frá 1. Januar kunnu vti hava tvey starvsfólk sett á fulla tíð.

Vit skulu søkja um stuðlar ymsa staðni frá til at dekka løninar.

Ætlanin er at søkja allar kommunur har vit hava skótaarbeiði, og kommunur har vit møguliga ætla at stovna skótabólkar. Her skulu vit ansa eftir, at vit ikki taka stuðulin sum

annars hevði fari til skótabólkin í økinum, og eisini mugu vit serliga vera varin, í teimum økjunum har skótabólkarnir ikki fáa stuðul frá kommununi, og møguliga í samband við at vit søkja stuðul, syrgja fyri at bólkarnir eisini fáa stuðul.

Eisini ætla vit at søkja virkir og grunnar um langtíðarstuðul o.s.fr.

Framyvir skulu allar legur og øll tiltøk geva avlop sum fer til løn til samskiparan av tiltakinum, skrivstovan skal sita sum samskipari av tiltøkunum, hetta vil siga, standa fyri ferðing, leigan av húsum, fáa tilboð uppá mat og útgerð o.s.fr. tó skulu fyriskiparar finnast til tiløkini, sum standa fyri sjálvum legunum/tiltøkunum.

Skrivstovan skal eisini standa fyri ymsum kampagnum, t.d eina kampagnu við heitinum "trygd í heiminum" skivstovan ger tilfari til 3-4 úlvafundir ið snúgva seg um trygd í heiminum, í hesum sambandi søkja vit stuðul frá tryggingarfeløgunum, og senda tíðindaskriv út til fjølmiðlarnar, á hendan hátt, fáa vit bæði pengar og umtalu.

Langtíðarætlanin er at skrivstovan skal deilast upp í trý ymisk størv, nevniliga: Skrivstovuleiðari, Samskipari, Skótaráðgevi.

Skrivstovuleiðarin stendur fyri allari umsiting, heimasíðuni, e-mail, posti, limaskipan o.t.

Samskiparin stendur fyri legum og tiltøkum – hesin fær lønina av yvirskotinum av legum og tiltøkum.

Skótaráðgevin tekur sær av samskifti við bólkar, stovnan av bólkumo.s.fr. og av kampagnunum – hesin fær løn frá stuðlinum frá  kommunum og frá kampagnnunm.

**Starvsfólk og tiltøk á Selatrað**

Ætlanin er eisini at fáa mininum eitt lønt starvsólk til Selatrað, sum tekur sær av deplinum og av starvsfólkadøgum o.t.

**Sjóskótar**

Bogi F. Christiansen er farin í gongd við sjóskótar á Eysturoynni, tað eru uml. 15 skótar, harav 13 eru nýggir limir.

Í løtuni húsast tey mest í skótahúsinum í Leirvík, í hesum sambandi vil Bogi gjarna vita um teir nýggju limirnir skulu innlimast í Leirvík, vit komu fram til at vit innlima teir í Leirvík fyri fyrst, og so eftir nýggjár verður nýggjur bólkur stovnaður í limaskipanini, og teir vera fluttir yvir.

Tey hava havt nakrar fundir, og skótarnir eru sera spentir at sleppa í gongd, og gleða seg til at fáa bátarnar.

At byrja við koma tey at brúka bátar frá Selatrað.

Tey hava tikið eitt einstaklingamerkið fyri at koma í gongd við okkurt.

Tey hava skriva eina grein sum tey ætla at senda til blaðið hjá teimum europeisku sjóskótunum.

Tey hava eisini tekna eitt merki, sum tey gjarna vila fáa gjørt.

Í byrjanini ætla tey at brúka t-shirtir ístaðin fyri búnar, ætlanin er eisini at gera t-shirtir til allar skótarnar at brúka, so hetta skal samskipast.

**Nýggjir bólkar**

Í løtuni eru vit í ferð við at stovna nýggjar bólkar ymsastaðni, Føroya Skótasamband er eisini í ferð við at stovna ymsa staðni. Í hesum sambandi varð avtala gjørd á stórfundinum hjá FSR um at man boðar hvør øðrum frá tá man stovnar nýggjar bólkar, soleiðis at man ikki forstýrar arbeiði hjá hvør øðrum.

Í síðstu viku, fingu vit eit ákæuruskriv frá FS tí at teir mettu at vit høvdu brotið avtaluna. Hetta kemst av eini úttalu sum er blivin misskild.

Vit hava havt fund við FS um hetta og eru komin fram til eina semju, vit bíða í løtuni eftir eini skrivligari umbering frá FS.

Arne greiddi frá støðuni.

Framyvir skulu vit ansa betur eftir, hvat vit úttala okkum um, og hvussu vit úttala okkum, serliga tá vit hava við hinar samskipaninar at gera.

**Fundur lokin:** 17.30

| Arne D. Madsen | Bjarni Hentze | Bogi F. Christiansen |
|---|---|---|
| | | |